FUGLAFJARÐAR BÝRÁÐ

# STARV

## SUM HAVNASTJÓRI VIÐ FUGLAFJARÐAR HAVN

Starvið sum havnastjóri við Fuglafjarðar havn verður hervið lýst leyst at seta tann 01. oktober 2008 ella so skjótt sum til ber eftir hetta.

**Starvið:**
Tú kemur at hava dagligu leiðsluna av Fuglafjarðar havn, somuleiðis sum tú eisini í starvinum kemur at átaka tær uppgávur við at marknaðarføra havnina í tøttum samstarvi við havnanevndina og býráðsleiðsluna.

**Førleikakrøv:**
Útbúgving sum skipsførari ella aðra viðkomandi hægri útbúgving og førleika í enskum máli bæði í talu og skrift, somuleiðis sum tú skalt duga at orða teg væl bæði munnliga og skivliga, hava teldukunnleika og kunnleika til nýmótans leiðslamboð.

Haraftrat skal tú eisini hava hollar leiðsluførleikar frá almennari ella privatari vinnu, og ávísar royndir innan sjóvinnu.

**Vit bjóða tær:**
Eitt spennandi og sjálvstøðugt starv, har tú sum leiðari fært møguleika fyri at menna havnina.

**Setanarviðurskifti:**
Starvið verður lønt sambært sáttmála við avvarðandi yrkisfelag, somuleiðis verður skrivligur sáttmáli gjørdur partanna millum um arbeiðstreytir vm.

**Starvstreytir:**
Umsøkjarar við royndum innan sjóvinnu hava fyrimun.

Royndartíðin verður sambært avvarðandi sáttmála.

**Hevur tú áhuga**
so ert tú vælkomin at senda skrivliga umsókn saman við prógvum og møguligum CV og viðmælum til Fuglafjarðar býráð, Postboks 30, 530 Fuglafjørður, og skal henda verða ráðnum í hendi í seinasta lagi fríggjadagin 15. august 2008 kl. 15.00.

**Fleiri upplýsningar**
fáast við at venda sær til Sigurð S. Simonsen, borgarstjóra á telefon 737777 ella Jákup Frants Larsen, býráðsskrivara á telefon 737702.

Býráðið skilar sær rætt til at velja millum umsóknirnar ella onga at taka.

*Fuglafjørður, tann 19. juni 2008*

**Fuglafjarðar býráð**

---

Lesið

Sosialin

-so eru tit við!

---

# KOYRIKORT TIL MOTORSÚKKLU



**Nýtt skeið til motorsúkklukoyrikort byrjar 5. august kl. 18.00.**

**Tilmelding hjá:**

| | |
|---|---|
| Jari Lykke | 503002 |
| Mikkjal Hansen | 722578 |
| Hugo Kristiansen | 225225 |




EYSTUROYAR TEORISKÚLI

---

## HEVUR TÚ EINA GÓÐA SØGU?

Vikuskiftisvaktin hjá

SOSIALINUM & PORTALINUM

er at hitta alt vikuskiftið á

22 50 00

Ringið um tit hava søgur, hugskot og tips ella um tit vilja kunna um fundir, tiltøk, konsertir o.a., sum fer fram kring alt landið í vikuskiftinum



VIVA

---



# TIL SØLU

Matr. nr. 56ci, Kvíggjartún 1, Argir.

Sprongt og planerað grundøki 942 m² til støddar.

Ognin liggur við síðuveg á Argjum, í C3 umráðisparti og 3 grundumráði, har loyvt er at byggja handlar, skrivstovuhølir, ráðleggingar- og tænastuvirki, ið hava samband við hetta. Loyvt er eisini at byggja skúlar, almennar stovnar og íbúðir.

Ognin verður seld um hóskandi boð fæst.

**Kaj Gaard · Tlf. 314107**

---

# ARGJA SKÚLI

Argjavegur 32 · FO-165 Argir
Postboks 2002 · Tel 30 25 10 · Fax: 30 25 11
marjun.holm@skulin.fo

# Lærarastørv í Argja skúla

**Søkt verður eftir tveimum lærarum at byrja 1. august 2008.**

- Starv 1 er fyri lærarar í niðursettum tímatali.
- Starv 2 er barnsburðarfarloyvi frá skúlaársbyrjan til 26.apríl 2009.
  Bæði størvini eru fultíðarstørv.

**Søkt verður eftir lærarum sum**
duga at samstarva, eru fyrikomandi, sýna næmingum og undirvísing sín eldhuga, tora at ganga nýggjar leiðir í undirvísingini og hava áræði til at taka ábyrgd.

**Starvslýsing**
Starv 1 hevur hesar lærugreinar:
Føroyskt, evning og stuðul í 2.fl. Danskt og kristni í 3 fl. Handarbeiði í 4 fl.
Starv 2 hevur hesar lærugreinar:
Føroyskt og heimstaðarlæra í 1fl.Enskt og danskt í 6.fl

**Lønar- og setanartreytir**
Støvnini verða sett við umsøkjarum við fólkaskúlalæraraútbúgving, men um lærarar ikki søkja størvini, verða fólk, ið ikki hava fólkaskúlalæraraútbúgving sett.

Størvini eru lønt í lønarflokki 18.1 – 27.4 sambært avtalu millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Lærarafelag.

**Umsóknir**
Umsóknir við lívsrensli og avrriti av prógvum og møguligum ummælum skulu vera skúlastjóranum í hendi í seinasta lagi sunnudagin 3.aug. kl 16.

Nærri kunning um størvini fæst við at ringja til

**Marjun Holm**, skúlastjóra,
J.Paturssonargøta 27
100 Tórshavn
tlf 302510 og 221466 ella

**Símun Abrahamsen**, varaskúlastjóra á tlf. 302510 og 221100.

Eisini ber til at senda teldupost til skúlan
*marjun.holm@skulin.fo*

---

**Argja skúli** hevur komandi skúlaár 325 næmingar í 1 .- 10. flokki, tveir flokkar í hvørjum árgangi. Á skúlanum starvast 33 lærarar, 1 skrivstovufólk, 2 húsavørðar og 6 vaskifólk. Argja skúli arbeiðir í løtuni við at styrkja samstarv millum heim og skúla og fyri fjølbroyttari, avbjóðandi og mennandi undirvísing. Og somuleiðis fyri góðum arbeiðsumhvørvi hjá øllum, sum virka í Argja skúla. Les meir um okkum á www.argjaskuli.fo
Skúlin stendur fyri stórari, spennandi útbygging uppi á Hamrinum á Argjum og flytur 1. undirvísingarpartur inn á sumri 2009 og allur skúlin á sumri 2010.

---

# SÓKNAST VERÐUR EFTIR AU-PAIR GENTU

Søknast verður eftir eini ungari gentu til eina danska familju á Ærø. Talan er um trý børn á 4, 6 og 8 ár. Tú mást gjarna verða áhugað í hestum

**Ring á telefon +45 62 53 30 31**